# Team Klaksvík tapti aftur

**HONDBÓLTUR** **Klaksvíkingar eru fyrst og fremst við fyri at læra. Tað verður hugsað um menningina av spælarunum, og ikki so nógv um úrslitni. Hesa ferð taptu uppflytararnir 32-19**

Uni Holm Johannesen

Gestirnir úr Klaksvík vunnu seg fram um í fyrsta álopinum, men síðan runnu teir bara aftaná.

Tað verður eisini uppgávan hjá Team Klaksvík í hesum kappingarárinum. At renna aftaná.

Fyrstu fýra landskappingardystirnir benda ikki á, at klaksvíkingur fara at standa hinum liðunum kurl yvirhøvur. Men ábyrgdarmenninir hava eisini gjørt greitt, at liðið er í fyrsta umfari við fyri at læra.

StÍF vann 32-19. Hálvleiksstøðan í høllini á Skála var 15-7.



*Savnsmynd*

Jørmund Joensen, StÍF, var mest eyðsýndur. Hann stóð fyri átta av málunum hjá heimaliðnum.

*uni@sosialurin.fo*

## Stuðulsleikarar mangla

KÍF kennir sviðan av, at fótbóltskappingin framvegis ikki er liðug. Gert Hansen og Arnbjørn Hansen hava verið lítið við seinastu umførini, tí teir eru knýttir at hópinum hjá EB/Streymi, sum stríðist um meistaraheitið. Harafturat verður Agnar Joensen ikki tøkur fyrr enn um góðar tríggjar vikur, tí vestmenningurin hevur spælt við VÍF í hesum kappingarárinum. Tá siga lógirnar, at tú skal bíða í ein mánað, áðrenn tú kann spæla fyri nýggja felagið.

### **KÍF - Neistin** 16-26 (6-16)

Dómarar: Sámal Paulason og Kári Hansen
Áskoðarar: 350 fólk
**10 min.: 2-7**
**20 min.: 4-12**
**40 min.: 8-18**
**50 min.: 11-22**

**KÍF:** Andrias Nielsen 4, Ási Dam 4 (1), Regin Petersen 3, Ingi Johannesen 1, Tony Weyhe 1, Rúni Joensen 1 (1), Jákup Trygvason 1.
**Neistin:** David Edvardsen 8 (2), Ingi Olsen 6, Rósing Rasmussen 4, Heini Hanusarson 3, Sjúrður Thomassen 2, Jákup Apol 1, Jón Ludvík 1.
Útvísingar: KÍF 5 – Neistin 5.

### **StÍF - Team Klaksvík** 32-19 (15-7)

Dómarar: Rúni Mohr og Ragnar Simonsen
Áskoðarar: 214 fólk
**10 min.: 5-2**
**20 min.: 11-4**
**40 min.: 21-9**
**50 min.: 27-13**

**StÍF:** Jørmund Joensen 8, Jógvan Berg 6, Marius Joensen 4 (2), Leivur Justinussen 4, Jóanes Prestá 3, Jógvan G. Joensen 3, Fríði Djurhuus 2, Jákup Berthelsen 1.
**Team Klaksvík:** Zarko Pejovic 10 (4), Dánjal Kjærbo 3, Andrias Ellingsgaard 3, Sámal Olsen 2, Steffan Kalsø 1.
Útvísingar: StÍF 3 – Team Klaksvík 6




***Teir bláu úr Neistanum, rætt og slætt sorlaðu kollfirðingar***

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Sorl!

**HONDBÓLTUR** **Neistin staðfesti væl og virðiliga sína støðu sum besta mansliðið í landinum. Verandi greipuvinnararnir vunnu við 10 málum, tá teir vitjaðu í Kollafirði**

Uni Holm Johannesen

Tað var lagt upp til ein oddadyst í Kollafirði í gjár.

Men at siga, at talan var um ein oddadyst, er at taka í so rívan til.

Tí tað var eingin oddadystur í Kollafirði.

– Vit vóru rætt og slætt bukaðir av. Sjálvsálitið var kanska ov stórt undan dystinum, og vit fingu ein ordiligan frammaná beinanvegin, sigur Suni Johannesen, KÍF.

Neistin smurdi kollfirðingarnar av. 16-26 vísti stóran talvan við teimum reyðu bókstavunum, tá dysturin var liðugur.

### Skrædnaði beinanveg

Neistin vann sær eina leiðslu á fimm mál beinanvegin.

Orsøkin var fremst av øllum, at kollfirðingarnir vóru lítið neyvir í álopsspælinum. Fleiri óneyvar sendingar og skeivar avgerðir eyðkendi álopsspælið.

Umframt tað, so spældi Ári Egason Dam, sum vardi málið hjá Neistanum, sera væl, og hann vardi fyri óteljandi atsóknum hjá heimaliðnum.

Neistin tók av og vann sær greiða leiðslu.

– Vit røkja ikki okkara innanhýsis uppgávur á vøllinum. Vit hava fingið eina flúgvandi byrjan í hesum kappingarárinum. Eg skal ikki siga, at vit ikki væntaðu okkum ein torføran dyst, men úrslitið prógvar, at tað restar nógv í, um vit skulu enda ovast, sigur Suni Johannesen.

Heimaliðið fekk ikki fleiri enn seks mál í fyrra hálvleiki. Tá hevði Neistin longu skotið 16 mál.

### Áki er við aftur

Neistin hevur tikið um endan, har teir sleptu í farna kappingarári.

Hópurin er lítið broyttur, uttan so, at fleiri av ungu leikarunum gera nú av álvara um seg. Rósing Rasmussen skeyt fýra mál í gjár, Bartal Hansen vardi málið eina løtu og Guðfinnur Thorsteinsson var eisini á vøllinum.

Áki Mørk, sum hevur verið stuðulsleikari í fleiri ár, hevur verið skaddur seinastu vikurnar, og hann var fyri fyrstu ferð á vøllinum í hesum kappingarárinum í gjár.

David Edvardsen var toppskjútti í bestu deildini í 2009/2010. Hann er ikki byrjaður eins væl í ár, men hann var toppskjútti í gjár við átta málum.

*uni@sosialurin.fo*